# BØNARLØTAN

**Mai** **2019** **34. árg.**

## *1. Mikudagur* *Sálmur 45*




*Lega fyri fólk við breki.*

### ZAREPTA

**Maria á Lakjuni Simonsen, Jákup N. Olsen, Jens Bech**

Nú byrja legurnar! Familjulegan fyri fólk við breki 16. - 19. mai hevur heitið „Virkið lív“ og er ætlað at stimbra likamliga, sálarliga og andaliga lívið við andakt, bíbliuundirvísing, lívssøgum, sangi, tónleiki, fimleiki, svimjing, ríðing, ítrivi, sansarúmi o.ø. Familjulegurnar byrja 20. mai.



*Ein hjálpandi hond*

## KRINGVARPIÐ

12. mai  sjónvarpsandakt, Pól í Skorini
19. mai  sjónvarpsandakt, Pól í Skorini
26. mai  sjónvarpsmøti úr Betesda, Klaksvík

## R7 (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## Føroysk møti í Jútlandi

4. mai kl. 19  í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjølds-gade 2A í Aalborg.

## USA, Nebraska, Ethnos 360
## Rachel og Peter Hansen, Caleb 16

30. apríl til 2. mai er Peter í Italia á fundi við øðrum trúboðarum. Evnið er „Trygdin hjá trúboðarum". 3. - 20. mai vitjar Peter í Føroyum. Biðið, at vitjanin verður til signing!

***2. Hósdagur*** ***4. Mós. 32.23-42***



## USA, Alabama, NTM
## Judy og Óli á Grømma Jacobsen

Til 14. mai eru vit í Føroyum; 18. - 27. mai í Missouri. Eg skal greiða frá arbeiðnum hjá okkum og tala í samkomum har 19. og 26. mai. 20. - 21. mai skal eg tala seks ferðir á stevnu fyri lærarar og leiðarar á venjingarskúlanum hjá NTM í Missouri, har Judy og eg arbeiddu frá 1968 til 1983.

## *3. Fríggjadagur* *Johs. 14.1-17*



**GRØNLAND,**
**Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen, Cecilie 16, Kristian 14**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð, Liljan 13, Leanna 12**

Tørvurin er stórur! Okkum manglar liðleiðarar, hjálparleiðarar, tónleikarar, kokkar, hjálparfólk til køk og matsal. Vaskifólk og umsjónarfólk. 23. - 29. juni, barnalega 9-12 ár. 30. juni til 6. juli, barnalega 9-12 ár. 7. - 13. juli, lega fyri ung, 13-16 ár. 14. - 20. juli, familiulega. Karsten Neshamar, +298 277297, Magnus Fjallsá. +298 511825, Ragnhild í Skorini Jacobsen +299 486448.





## *4. Leygardagur* *4. Mós. 33.1-24*



**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**

Eg komi heim úr USA 5. mai frá bíbliutýðaraskeiði fyri deyv. Viktor Szijjarto úr Slovakia bjóðar okkum 25. - 30. mai at fortelja samkomunum har um deyvaarbeiðið. Fleiri deyv eru komin til trúgv í Jyllandi og ynskja at verða doypt til Harran.

★ Í dag fyllir Noah Flanagan 10 ár.

## *5. Sunnudagur* *Jóhs. 14.18-31*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Vit fyrireika nú summartiltøk við toymum ymsastaðni í Turkalandi í juli. Biðið um vælvild og vísdóm. 5. mai byrjar muslimska ramadanføstan. Biðið, at fólk finna sannleikan, tí í føstuni eru tey spyrjandi og leita eftir svari upp á lívsins spurningar og um ævinleikan.

## *6. Mánadagur* *4. Mós. 33.25-56*



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

Vit verða í Føroyum 6. mai til mánaðarskiftið mai-juni. Tá fara vit til North Cotes. Sonur okkara Brian og konan Lili búgva her tætt hjá okkum. Tey fara til PNG sum trúboðarar um nýggjársleitið at virka á somu oyggj, vit sjálv vóru á, og sum systir hansara Annika við familju nú býr á. Har eru um 39 ymiskir ættarbólkar.



**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Annika og Poul Færø**

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Miriam Joy 15, Noah 12, Lydia Sigrid 2**

## *7. Týsdagur* *Jóhs. 15.1-27*



**DANMARK, Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 10, Andreas 9, Kristina 8**

Annanhvønn fríggjadag er spælistova, har foreldur við smábørnum hittast til sang, eitt orð úr Bíbliuni og eina máltíð. Í mai og juni er próvtøkutíð, og tá er strævið hjá teimum lesandi.

## *8. Mikudagur* *Sálmur 46*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit eru so takksom fyri páskamøtini. Í mai minnast vit, at 80 ár eru liðin, síðan nakrir fáir menn byrjaðu at biðja saman hvønn sunnudag fyri at stovna Calvary Church. Harrin hevur í trúfesti signað arbeiðið, sum tá varð byrjað. Vit hava serstøk møtir 19. mai at minnast Harrans trúfesti móti samkomuni.

⋆ Í dag fyllir Terji í Prestgarði 7 ár.

## *9. Hósdagur* *4. Mós. 34.1-29*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Okkum tørvar bæði ung og eldri at hjálpa á legunum. 18. - 28. juni, 6-12 ár; 3. - 11. juli, 6-12 ár; 16. - 26. juli, 6-12 ár; 30. juli - 6. aug., ungdómslega; 7. - 10. aug. bíbliuskeið. Victor Dánjalsson, tel. 230211, Pætur Gerðalíð, tel. 235701!

## *10. Fríggjadagur* *Jóhs. 16.1-15*



**DANMARK, Skovlunde**
**Susan og Øssur Berghamar**

Andaktirnar á Sjúklingahotellinum savna ofta væl av fólki, sum hoyrir orð Harrans framborið í sangi og boðskapi. Tær eru gott sambindingarlið millum okkum og fólk, sum eru niðri í sjúkraørindum. Biðið, at hesar løtur verða til hjálp, lívgan og signing! berghamar@kristnastova.dk

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen, Natan 16**

## *11. Leygardagur* *4. Mós. 35.1-15*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Á hvítusunnu 7. - 9. juni er samkomulega í Undløse á Sjællandi (www.birkedal-lejren.dk). Peter Maiden frá OM undirvísir á leguni. Vit vóna, at luttøkan verður góð.

## *12. Sunnudagur* *Jóhs. 16.16-33*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 13, Rebekah 11, Lydia 9**

Síðan á jólum hava vit lært tríggjar kurdar í eini persiskari kirkju. Síðstu vikurnar eru fimm fólk komin afturat í henda bíbliubólkin. Vit eru takksom fyri møguleikan og biðja um vísdóm at læra hesi, sum vísa evangeliinum áhuga.

## *13. Mánadagur* *4. Mós. 35.16-34*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Vit takka fyri allan blíðskap, vælvild og umsorgan, meðan vit hava verið heima í vetur. Takkið Harranum fyri allar handverkararnar, ið koma yvir í mai og juni at gera starvsfólkahúsið liðugt at brúka í summar. Biðið um Harrans varðveitslu, og at alt gongur væl. Biðið somuleiðis fyri fyrireikingunum til sjálvar legurnar og arbeiðnum at gera Juvel sjókláran; hann skal hava høvuðssýn hvørt ár.

## *14. Týsdagur* *Jóhs. 17.1-26*



**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

27. mai fer Juvel II av Klaksvík og væntast til Nuuk 4. juni. Haðani verða allar bygdirnar vitjaðar heilt norður til Thule, íroknað býin Qaanaq og fimm bygdir har um leiðir. Hetta er fyrstu ferð, Juvel II vitjar Thuleøkið. 12. aug. væntast Juvel II aftur til Nuuk. Haðani verður siglt til Suður- og Eysturgrønlands. Juvel II væntast aftur á Klaksvík 18. sept.

**ITALIA, Sant’Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 16, Megan 14, Trisha 7, Emma 2**

## *15. Mikudagur* *Sálmur 47*



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

Vit hava seinastu tíðina vitjað føroyskar sjúklingar á Aalborg Sygehus. Gott hevði verið at frætt frá teimum, sum koma niður í sjúkraørindum. Malta +45 98944370 ella +45 40438166 ella skriva á hadju@olivant.fo

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 11**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**

## *16. Hósdagur* *4. Mós. 36.1-13*



**NTM FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 8, Tabita 5,**
**Debora 3, Natan 0**

Øll Bíblian er týdd til 677 mál, NT til 1500 mál og partar av Bíbliuni til onnur 1107 mál. 110 mió. fólk, sum tosa 1559 ymisk mál, hava enn ongan part av Bíbliuni á egnum móðurmáli. Biðið fyri teimum, sum týða Bíbliuna.



**FØROYAR**
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Maria og Jens Bech**
★ Í dag fyllir Emily Jacobsen 9 ár.

## *17. Dýri biðidagur* *Jóhs. 18.1-23*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Tit hava fingið bønarsvar, tí Anna fær nú sera virðismikla sjúkuviðgerð, sum er til nógvan bata. Uttan hesa viðgerð høvdu vit ikki vitjað í Afrika og Føroyum. Umleið helvtin av saafi hoyrir nú bíbliu-útvarpssendingarnar. Ein onnur radiostøð kundi rokkið hina helvtina. Biðið, at eigarin gevur loyvi at senda á saafimáli. Sonurin Charlton er fegin um sítt starv sum telduforritari. Hann býr heima hjá okkum.

**ÍRLAND, Global Serve Int.**
**Guðrun og Ivor Tutty, Karina 17**

## *18. Leygardagur* *3. Mós. 15.1-15*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 11**

Tænastan á alnótini hevur framgongd. Vit hava fingið fleiri góðar afturmeldingar, eisini frá gudloysingum. Á alnótini náa vit fleiri, men vísdómur, skynsemi og vitan krevst á fleiri økjum. Tí umhugsi eg at taka skeið at læra meir um upptøku og marknaðarføring.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

⋆ Í dag fyllir Uhenya Lukama 8 ár.

## *19. Sunnudagur* *Jóhs. 18.24-40*



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 14, Victoria, 12, Emma Grace 11, Jónatan 9, Markus 7, Evita Linda 4, Joy Hanna 2**

Biðið, at fólkið í samkomuni tosar saman um ósemjur í kærleika, og at vit vaksa í uppgávunum at elska og fyrigeva hvørt øðrum, soleiðis sum Kristus áleggur okkum.

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 8, Leah Eve 5, Abigail 0**

## *20. Mánadagur* *Ápost. 1.1-26*



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 1**

Eg havi ferðast saman við øðrum gjøgnum fjallalendið í Kovol at vitja størstu bygdirnar har. Fólk vóru glað at hitta okkum og hoyra, at trúboðarar endiliga koma at arbeiða hjá teimum á teirra máli. Í mai keypa vit útgerð at byggja okkum hús. Vit gleða okkum at tæna fólkinum í Kovol.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 7**

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen, Ísak 16**

## *21. Týsdagur* *3. Mós. 15.16-33*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 10, Noah 9, Karis 5,**
**Judah 3, Ethan 1**

Biðið fyri Harder familjuni, sum kemur at hjálpa okkum at byggja upp í húsini, og fyri Tessu, sum kemur at hjálpa at skúla børnini. Biðið, at børnini, sum enn einaferð flyta, knýta vinabond og skjótt kenna seg heima. Biðið, at vit megna málið og finna javnvág millum familjulív og samkomutænastu; eisini at vit fáa vísdóm at gera lærisveinar. Biðið fyri Rebeccu, sum rættlesur NT til fyrstu prentútgávu seinni í ár.

## *22. Mikudagur* *Ápost. 2.1-21*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Arbeiðið uppá Qaamaneq í Nýfoundlandi er um at vera liðugt. Í løtuni eru tríggir skiparar, av teimum ein føroyingur, til reiðar at fara við bátinum úr Nýfoundlandi umvegis Labrador til Grønlands miðskeiðis í juli. Tørvur er á einum persóni afturat. Skriva til lightoftheworldaid@gmail.com, um tú hevur áhuga. Enn er ávísur fíggjartørvur til verkætlanina.



**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

★ Í dag fyllir Judah Flanagan 4 ár.

## *23. Hósdagur* *Ápost. 2.22-47*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Vit virðismeta bønir tykkara, sum vit halda á at endurskoða týðingar av NT.

**FØROYAR**
**– Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Jenny 11, Svend 9, Terji 6, Petra 5**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Khuldah og Sámal Mikkelen,**
**Josva 9, Ester 8, Samuel 4**
★ Í dag fyllir Hanna Sharp 11 ár.
★ Í dag fyllir Josiah Lukama 15 ár
★ Í dag fyllir Nya Flanagan 11 ár.

## *24. Fríggjadagur* *3. Mós. 16.1-16*



**BRASILIA, RECIFE**
**Maria Schwartson** frá DTS-bíbliuskúlanum er farin til Bolivia í missión til 17. juni.

**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 15, Micah 12, Ezra 10, Uhenya 8, Boas 5**

**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 15, Rebekka 14, Hanna 11**

## *25. Leygardagur* *Ápost. 3.1-26*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg rættlesi 2. Timoteusarbræv, Filippibrævið og Filemonbrævið við ymiskum málhjálparum. Vit halda á við bíbliutímunum fimm kvøld um vikuna. Biðið fyri vinkonu míni og manni hennara í truplari støðu, at Harrin gevur teimum vísdóm at gera tað rætta. Ein 10 ára gomul gentu breyt beinið illa mitt í apríl. Biðið, at tað grøðist rætt, og at hon ikki fær trupulleikar av tí seinni. Ætlanin er at skifta takið á húsunum hjá mær, men enn er óvist, nær tað liggur fyri hjá handverkaranum. Vónandi fer tað ikki at regna, meðan takið verður skift. Biðið, at vit fáa arbeiðsfólk og tilfar.

⋆ Í dag fyllir Noa Berghamar 13 ár.

**SVEIS, Nyon, Westlake Church**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 5, Micah 5**

## *26. Sunnudagur* *3. Mós. 16.17-34*



**GUINEA VESTURAFRIKA,**
**Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 10**

Í summar fara vit í farloyvi, sum má fyrireikast. Dreingirnir hava seks vikur eftir í skúla. Biðið fyri Allan, nú hann skal siga øllum vinmonnunum farvæl. Tað gongur væl við gistingarhúsinum og við máldeplinum, sum vit ynskja at handa øðrum í góðum standi.

## *27. Mánadagur* *Ápost. 4.1-20*



**SUÐURAFRIKA, Mamelodi, OM**
**Aids Hope**
**Tanja Mortensen**

Ungdómslega verður her 21. - 23. juni við evninum „At fylgja Jesusi". Biðið, at tey ungu velja at fylgja Honum, sum øllum valdar!

★ Í dag fyllir Jonathan Jacobsen 17 ár.

## *28. Týsdagur* *3. Mós. 17.1-16*



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 9, Nana 7, Louie 5**

Biðið fyri okkara samkomukafé, serliga at fleiri nýggj fólk koma, og at vit læra tey at kenna. Biðið eisini fyri bíbliubólkinum, ið Shino hevur við nøkrum kvinnum í grannalagnum.

**FILIPOYGGJAR, Manila, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**


**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Selma Godtfred, Kristianna J. Heinesen, Jónvør Christiansen, Lea Wolles, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

## *29. Mikudagur* *Sálmur 48*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 14, Aron 7, Noah Kristian 5**

Til tíðir er arbeiðsbyrðan á The Well International ovurstór. Biðið um styrki og dirvi at halda á í arbeiðnum.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *30. Kristi himmalsferðardagur* *Ápost. 4.21-37*

**OM Føroyar**

Vit fyrireika summarið 2019. Transform ráðstevnan fyri +18 ár verður í Athen 8. - 13. juli við møguleika at fara á outreach aftaná. Ung, 15-18 ár, fara á TiM í Albania, Moldova og Grikkalandi 13. - 26. juli. TeenStreet fyri 13-17 ár, umframt hjálparfólk og liðleiðarar, verður í Týsklandi 27. juli - 3. aug. Føroyingar verða við til øll hesi tiltøk. Tilmelding á info.fo@om.org ella sí www.om.fo. Tilmeldingarfreistirnar eru 10. mai, 20. mai og fyrst í juni; jú skjótari, jú betri.

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *31. Fríggjadagur* — *Jóh. 13.21-38*

**BÓKATÆNASTAN**

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!




**Nýggj bók!**
**Sebastian Stakset:**
**Kun Lyset kan besejre mørket**

**198 kr.**

Sebastian Stakset, f. 1985, var í fleiri ár leiðari í svenska hiphop bólkinum Kartellen, og var kendur sum Sebbe Staxx. Í bókini greiðir hann frá, hvussu hann varð stýrdur av tí ónda. Hann livdi eitt sjálvoyðileggjandi lív merkt av brotsverkum; men so hendi umbroytingin, tá hann lærdi frelsaran Jesus Kristus at kenna og flutti úr myrkinum inn í ljósið. Sebastian ferðast nógv í Skandinavia og sigur frá lívi og umvending síni.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo